

Bjørgfríð Ludvig frá Vinnuhúsinum og Ingeborg Vinther frá Føroya Arbeiðarafelag



Eyðfinnur Jacobsen og Hermann Oskarsson vóru við í kjakinum

# Nýggj skipan innan eitt ár

**Partarnir á arbeiðsmarknaðinum eru nú til reiðar at samráðast um skipan til loysn á ósemjum á arbeiðsmarknaðinum**

ARBEIÐSMARKNAÐUR
*Rigmor Dam*

Hóast særdar kenslur og gamalt agg greitt kom til sjóndar á pallborðsfundinum millum partarnar á arbeiðsmarknaðinum í Útvarpshøllini mánakvøldið, eydnaðist tað kortini at røkka semju um, at tíðin nú er búgvin til, helst innan eitt ár, at ein loysn verður funnin á áralongu trætuni um skipan av gerðarætti í onkrum líkið.

Arbeiðsbólkurin, sum landsstýrismaðurin í vinnumálum, Bjarni Djurholm, hevur sett at arbeiða við málinum, verður karmur um samráðingar millum partarnar á arbeiðsmarknaðinum.

Hetta var høvuðsniðurstøðan á fundinum, sum var í útvarpshøllini, har spurningurin um, hvat kann gerast fyri at fáa betri lag á føroyska arbeiðsmarknaðinum var settur. Endamálið við fundinum, sum varð fyriskipaður av Javnaðarflokkinum, var at fáa ymsu sjónarmiðini fram, umframt greiðar grundgevingar fyri teimum. Umboð fyri arbeiðsmarknaðin og politikarar úr fýra størstu flokkunum vórðu bodnir við at kjakast um heita evnið.

Tí eitt er eyðsæð, ikki er lætt hjá hvørgum partinum at taka mótpartin fyri fult, hetta gjørdist greitt longu frá fyrstu løtu. Tí tað, sum flestu luttakarar í kjakinum sóu sum størstu forðingina fyri einum fruktargóðum samstarvi var, at partarnir ikki vísa virðing fyri mótpartinum, og at álitið sostatt ikki er av tí besta.



Kaj Leo Johannesen var ein av politikarunum, sum var við á fundinum

## Politisk uppílegging

Eitt stríðsmálið hevur eitt nú verið, hvør skal greiða ósemjur á arbeiðsmarknaðinum, partarnir sjálvir, ella um politiski myndugleikin skal leggja uppí.

Umboðið fyri Vinnuhúsið, Bjørgfríð Ludvig, kundi hugsað sær, at lóggivið var um ein fastan gerðarætt, og umboðið fyri Fíggjarmálaráðið, Tummas Magnussen eftirlýsti lóggávu um arbeiðsrætt.

Her vístu umboðini fyri fakfeløgini, Gunnleivur Dalsgarð frá Starvsmannafelagnum og Ingeborg Vinther frá Føroya Arbeiðarafelag á, at so leingi politiski myndugleikin í heilum hóttir við at leggja upp í og taka ræðið av feløgunum, er ilt at hava álit á mótpartinum.

Eitt nú segði Ingeborg Vinther tað vera nærum ógjørligt at fáa arbeiðsgevarasíðuna at viðvirka til at gera karmar fyri loysnir á trætum á arbeiðsmarknaðinum, so leingi sum politiski myndugleikin alsamt kemur við útmeldingum. Sum hon segði, so bendir alt á, at bæði tann almenni og privati arbeiðsgevaraparturin alla tíðina hevur bíða eftir, at Løgtingið skal leggja uppí. Tí er einasta háttur at betra um viðurskiftini á arbeiðsmarknaðinum, sambært Ingeborg Vinther, at arbeiðsgevarin ikki framhaldandi roynir at kasta ábyrgdina yvir á Løgting og Landsstýrið, og samstundis er eisini av størsta týdningi, at Landsstýrið ikki leggur seg út í viðurskiftini á arbeiðsmarknaðinum.

- Mótparturin má duga at skilja, at ein treyt fyri at ein skipan skal koma at rigga, er, at allir partar taka undir við henni, og at eingin kann smoyggja eina skipan yvir fakfeløgini, segði Ingeborg Vinther, sum saman við Gunnleivi Dalsgarð legði landsstýrinum eina við ikki at leggja uppí arbeiðið at gera nýggja skipan til at loysa ósemjur á arbeiðsmarknaðinum, men at lata partarnar sjálvar loysa arbeiðsmarknaðarmál.

## Gongu feløgunum á møti

Og hetta er eisini tað, sum Landsstýrismaðurin í Vinnumálum, Bjarni Djurholm er komin fram til, eftir onkra miseydnaða roynd at fáa í lag eina skipan um loysn á ósemjum á arbeiðsmarknaðinum.

Tí legði hann í orðaskiftinum dent á, at arbeiðsbólkurin, sum hann nú hevur sett niður, skal vera mannaður við trimum umboðum fyri løntakararnar og trimum umboðum fyri arbeiðsgevararnar, umframt ein óheftan formann, sum í hesum førinum verður Kári á Rógvi, løgfrøðingur.

- Arbeiðssetningurin til arbeiðsbólkin er breitt orðaður, so talan er ikki um at smoyggja nakað niður yvir partarnar á arbeiðsmarknaðinum, segði Bjarni Djurholm, sum eisini metti útlit vera fyri, at nevndin innan hesar karmar kann náa ætlaða málinum, nevniliga at røkka eini semju á økinum, sum antin kann vera avtalað, ella lóggivið verður um.

- Haldi sjálvur tað vera skilabest at forankra semjuna í lóggávu. So kenna allir partar ábyrgd mótvegis nýggju skipani, ikki minst politiski myndugleikin. Men tað fara so partarnir á arbeiðsmarknaðinuim at avgera, segði Bjarni Djurholm, sum í fyrstu syftu hevur sett tíðarætlanina soleiðis, at bólkurin skal verða liðugur við arbeiðið í seinasta lagi 31. januar 2004.

- Gongur arbeiðið væl, er hugsandi, at møguligt lógaruppskot kann leggjast fyri løgtingið áðrenn seinasta framløgudag, uml. 5. mars. Er skotbráið ov stutt, so verður tíðarætlanin sjálvsagt broytt. Arbeiðið stendur og fellir ikki við ásetingini av eini dagfesting, tvørturímóti. Arbeiði fer at taka ta tíð, sum er neyðug, segði Bjarni Djurholm, sum við hesum arbeiðið hevur ásannað, at lítið og einki er hent á økinum í ártíggju, og tí heldur tað verða rætt, at politiski myndugleikin nú tekur stig til at slóða fyri nýggjum skipanum, sum, eftir hansara tykki, lóggevast skulu fyri.

### Fakta

Nevndin, sum Bjarni Djurholm hevur skotið upp at seta, at viðgera uppskot til skipan ella løgtingslóg um arbeiðssemjur, hevur henda arbeiðssetning:

Nevndin skal gera uppskot til skipan, sum kann viðgera trætumál og spurningar um sáttmálabrot við atliti at

- skjóta viðgerð,
- at samfelagslig áhugamál verða havd í huga, serliga at ósemjur og sáttmálabrot verða loyst í eini rættarskipan,
- at kunna hjálpa tí partinum, sum líður undir sáttmálabroti, at fáa sín rætt og møguliga uppreisn, so skótt sum til ber.

Harumframt skal bólkurin gera uppskot til broytingar í L. nr. 86 frá 31.03.1928 for Færøerne om mægling i arbejdsstridigheder, semingslógin. Bólkurin skal endurskoða og dagføra lógina sum heild,

- gera uppskotið soleiðis, at lógin fatar um bæði privata og almenna arbeiðsmarknaðin
- og soleiðis, at lógin hóskar til nútíðar føroyska arbeiðsmarknaðin og siðvenju.



# Ivasom avtala um vinningsbýti



Føroya Tele skal rinda 17 milliónir krónur í vinningsbýti næsta ár, men tað er ivasamt, um nevndin gongur við til tað, tí stovnurin stendur fyri stórum íløgum, m.a. í nýggja bygningin, sum sæst á myndini

**Fíggjarmálaráðið hevur sett 17 milliónir krónur í vinningsbýti frá almennum partafeløgum á fíggjarlógina fyri næsta ár. Tað verður gjørt, hóast Vinnumálaráðið greitt hevur mótmælt. Skjøl í málinum prógva, at Karsten Hansen sigur ósatt, tá hann vil vera við, at øll samgongan vil hava Føroya Tele at rinda upphæddina**

FÍGGJARLÓG 2004
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Tað er als ongin avtala gjørd í samgonguni um, at Føroya Tela skal gjalda landskassanum 17 milliónir krónur í vinningsbýti næsta ár.

So avgjørdur er Bjarni Djurholm, landsstýrismaður við vinnumálum. Tað er beinleiðis í andsøgn við tað, sum Karsten Hansen, landsstýrismaður við fíggjarmálum, segði við Útvarp Føroya mikudagin.

Vinningsbýti á 17 milliónir krónur frá almennum partafeløgum er longu sett sum inntøka á fíggjarlógini næsta ár. Talan kann bara vera um Føroya Tele, tí roknað verður ikki við stórvegis vinningsbýti frá Atlantsflogi.

Sambært Karsten Hansen er øll samgongan samd um, at almenna partafelagið Føroya Tele eigur at gjalda landskassanum 17 milliónir krónur næsta ár. Landsstýrismaðurin heldur tað vera alt ov lítið, at Føroya Tele bert hevur rindað eina millión í vinningsbýti síðstu árini, tá yvirskotið hevur verið 50 milliónir krónur árliga.

Hákun Steingrímsson, nevndarformaður í Føroya Tele, sigur tað ikki bera til at avgera longu nú, hvussu stórt vinningsbýti hjá Føroya Tele verður næsta ár. Nevndin hevur bara partafelagslógina at halda seg til, og hon ásetir, at nevndin á ársaðalafundinum ger av, hvussu stórt vinningsbýti parteigarin Føroya landsstýri kann fáa frá felagnum næsta ár. Sostatt kann nevndin í fyrsta lagi í mars avgera vinningsbýti.

## Eingin avtala

Samgongulimir, sum Sosialurin hevur tosað við, siga seg onki kenna til nakra avtalu í samgonguni um, at Føroya Tele skal rinda eitt ávíst milliónatal í vinningsbýti.

– Eg kenni onki til slíka avtalu, og eg fari ongantíð at góðkenna slíkar samtyktir, sum eru so grundleggjandi í andsøgn við lógásetingar um partafeløg og ábyrgd hjá leiðslu og nevnd, sigur Poul Michelsen, tingmaður Fólkafloksins.

Og landsstýrismaðurin, ið hevur Føroya Tele undir sær, ger greitt, at hann ikki hevur gjørt nakra avtalu um vinningsbýti hjá almennum partafeløgum.

– Eg havi onga avtalu gjørt. Tvørturímóti havi eg víst á, bæði í skrift og talu, at vit kunnu ikki góðtaka, at vinningsbýti verður ásett frammanundan. Vit hava víst til partafelagslógina, og enn vita vit als ikki, um tað kann forsvarast at seta 17 milliónir krónur av til vinningsbýti, sigur Bjarni Djurholm.

## Mótmæli á skrift

Sosialurin hevur biðið um innlit í málið, og tað skjalprógvar, at Vinnumálaráðið dúgliga hevur mótmælt í september mánaði, at vinningsbýtið verður sett á fíggjarlógina.

Í einum brævi frá Bjarna Djurholm, landsstýrismanni, tann 18. september til Fíggjarmálaráðið verður sagt, at eitt »realistiskt vinningsbýti frá almennum partafeløgum kann ásetast til 7 milliónir krónur«. Altso minni enn helvtin av tí, sum nú er sett á fíggjarlógina.

Landsstýrismaðurin vísir til ásetingarnar í partafelagslógini, sum siga, at »Generalforsamlingen må ikke beslutte uddeling af højere udbytte end foreslået eller tiltrådt af bestyrelsen«, og tí kann landsstýrið ikki áseta annað vinningsbýti enn nevndin fyri Føroya Tele kemur til í komandi ári.

Í einum øðrum teldubrævi frá umsitingini í Vinnumálaráðnum til umsitingina í Fíggjarmálaráðnum dagin áðrenn, 17. september, verður somuleiðis sagt frá, at landsstýrismaðurin metir tað vera »órealistiskt at hækka útlutingina frá almennum partafeløgum til 17 milliónir«.

Sostatt mótmælir Bjarni Djurholm, at vinningbýti frá almennum partafeløgum verður sett til 17 milliónir krónur, og harvið sigur Karsten Hansen ósatt, tá hann sigur alla samgonguna verða samda í málinum.

### Fakta

**Partafelagslógin:**

**§112:** Beslutning om fordelingen af det overskudsbeløb, der er til disposition efter årsregnskabet, træffes af generalforsamlingen. Generalforsamlingen må ikke beslutte uddeling af højere udbytte en foreslået eller tiltrådt af bestyrelsen.

**Viðmerking:** Til grund for denne bestemmelse ligger den opfattelse, at det i almindelighed er bestyrelsen, der har den bedste mulighed for at bedømme selskabets økonomiske stilling, og at bestyrelsen – overfor aktionærers ofte umiddelbare ønske om det højest mulige udbytte – forsvarer selskabets langsigtede interesser

# Almennu útreiðslurnar øktar eina milliard

**Almenna nýtslan er nógv økt síðstu fýra árini, vísa feskastu hagtølini frá Hagstovu Føroya. Samlaðu almennu útreiðslurnar eru hækkaðar við einari milliard síðan 1998**

HAGTØL
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Almennu útreiðslurnar eru øktar eina góða milliard síðan 1998. Tað svarar til ein vøkstur á góð 6 prosent um árið.

Tað hevur leingi verið ført fram, at almennu útreiðslurnar eru nógv hækkaðar síðstu árðini, men nú verður tað so eisini staðfest í Hagtíðindum fyri oktober. Størsti vøksturin er í almennu nýtsluni – 790 milliónir krónur ella 9 prosent um árið. Næststørsti vøksturin er í íløguútreiðslunum, sum 323 millónir krónur.

Almennu útreiðslurnar vóru 4,9 milliardir tilsamans í 2002. Av hesum er almenna nýtslan 2,7 milliardir krónur.

Almenna nýtslan er lønarkostnaðir og útreiðslur av vøru- og tænastukeypi. Tá tosað verður um samlaðu almennu útreiðslurnar skulu peningaveitingar, sum tað almenna letur húsarhaldum, fyritøkum og feløgum, og almennar íløgur eisini roknast uppí.

Heimastýrisfyrisitingin eigur størsta partin av almennu nýtsluni. Í 2002 var hon 1,8 milliard krónur í mun til 1,3 milliardir krónur í 1998. Kommunurnar hava økt nýtsluna frá 332 milliónum krónum í 1998 til 558 milliónir krónur í 2002.

Til ber at samanbera almennu nýtsluna í Føroyum við hana í Danmark og Íslandi. Verður nýtslan gjørd upp í mun til bruttotjóðarúrtøkuna liggjar Føroyar ovast í almennari nýtslu við Danmark á øðrum plássi og Íslandi á triðja plássi.